## DAGSINS MEINING

# Búskapurin, einskiljing og blokkstuðul

Viðhvørt tykist tað, sum búskaparligi veruleikin hevur ringt við at treingja ígjøgnum á politiska leikvøllinum. Vit hava í vikuni verið vitni til, at landsbankastjórin er komin við broyttum tølum fyri búskaparvøkstur, ikki bert fyri í ár og næsta ár, men eisini tvey ár afturút. Við øðrum orðum hevur vøksturin í føroyska búskapinum ikki verið so stórur, sum vit hava hildið, og sitandi samgonga hevur reypað um. Vøksturin í inniverandi ári nærkast misteinkiliga nógv null, og hvør veit, kanska ein endurskoðan um tvey ár fer at vísa júst hetta.

Okkara fíggjarmálaráðharri, ið hevur sagt í sjónvarpi, at hann ongantíð fór at leggja eina fíggjarlóg við halli fram, tosar nú um hall á fíggjarlógini. Skjótt gongur hvønn vegin, má ásannast, og spennandi verður, um Karsten Hansen nú fer at leggja frá sær, so onkur annar kann standa fyri fíggjarlógini við halli.

Búskapurin í Føroyum er stagneraður, og tað er alt, ið bendir á, at vit mugu spenna beltið inn í Føroyum komandi árini. Skilagóðu røddirnar, ið hava ávarað um gongdina, hava verið kveistraðar til viks við ákærum um at spreiða ræðumyndir, undirbrotligheit o.s.fr.

Blokkniðurskurðurin uppá 366 milliónir um árið – eina góða millión um dagin – byrjar so smátt at merkjast, hóast veljarin var fyrigykladur, at hetta ikki fór at vera so. Vit sóu, hvussu heimahjálpin var skerd herfyri, og nú verður tosað um at leggja alla eldrarøkt út til kommunurnar, allarhelst uttan at peningur fylgir við.

Alt hetta burdi gjørt, at politkarir nú steðgaðu á og løgdu høvdið í blot fyri at tryggja, at samfelagið ikki rennir seg í veruliga kreppu. Tíverri sær tað út sum, at veruleikin hevur ringt við at treingja ígjøgnum.

Nú verður tosað um at privatisera Føroya Banka og lata peningin fara til niðurgjald av landskassaskuld og blokkniðurskurð. Við øðrum orðum vilja samgongupolitikarar fara at skerja blokkin uppaftur meir, nú tað av álvara byrjar at sansa at í landsbúskapinum og vit fáa hall á fíggjarlógini. Hetta er ábyrgdarleyst og veruleikafjart. Hvussu nógv lond hava onga uttanlandsskuld? Er tað realistiskt at gera útrokningar útfrá null skuld í allar ævir frameftir?

Skal Føroya Banki privatiserast, so er uppskotið um at lata øllum føroyingum partabrøv tað besta. Tá kemur tað meiniga føroyinginum til góðar. Tað kann væl verða, at tað í síðsta enda verða tey somu, ið eiga bankan, men í hvussu so er, so sleppur tann einstaki sjálvur at raðfesta, hvussu peningurin frá eventuellari sølu skal brúkast, heldur enn at peningurin verður brúktur til at skera blokk við, samstundis sum vælferðartæansturnar verða skerdar og øki verða kloynd niðuryvir kommunurnar, helst uttan pening. Samgongan hevur við sera vánaligur raðfesting síni skatt álitið millum manna somikið nógv, at føroyingurin er nógv betur stillaður við sjálvur at umsita vinningin av privatiseringini av Føroya Banka sum einstaklingur. Uppskotið hjá Kristinu Háfoss kann bert brúkast, um samgongan dugir betur enn borgarin at raðfesta landsins pening, men samgongan hevur prógvað júst tað øvugta.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bemærkning til Maersk og Atlantis udmærkede nye bonusordning

**Jógvan Elis Danielsen**
*Hvalba*

Jeg er endda meget tilfreds med, at der endelig vises lidt konkurrence mellem disse to flyselskaber, og vi er mange der håber, at dette kun er den første spire.

En priskrig har vi manglet i mange år.

Hvad ligner det, at en flybillet til USA, skal være billigere end en til Færøerne.

Men, men. Hvorfor skal vi færinger, der bor i Danmark og flyver hjem 3-4 gange om året, ikke kunne være med i den nye bonusordning og nyde godt af denne.

Det er min mening, at der er en forskelsbehandling af kunderne (passagererne) så det basker.

Danskere der bor på Færøerne, kan jo nyde godt af bonusordningen.

Har de to flyselskaber lyst og vilje til at gøre noget ved problemet?

Det kunne for eksempel være rabat når samme selskab benyttes tre gange inden for samme år.

Imødeser med forventning en tilfredsstillende løsning.

# Lestrar Vertshúsið

TÍÐINDASKRIV

Ung lesandi ídag hava ikki nógv støð í Tórshavn at hittast aftaná skúlatíð. Vertshúsið ætlar at bøta um hetta og bjóðar lesandi kjallaran í Vertshúsinum hvønn fríggjadag frá Kl 15.00-18.00. Har kunnu ung fólk hittast og hugna sær fyri sámuligar prísar.

Nú Fríggjadagin verður lagt til brots við móttøku Kl 15.00 og Kl 16.00 verður konsert við HEADACHE BLUES TREO.

Øll ung lesandi á Studentaskúlanum, Handilsskúlanum, Tekniska Skúla, Sjómansskúlanum o.s.fr. eru vælkomin.

# KÍ heldur 99-ára føðingardag

**Leygardagin 23. august heldur KÍ sín 99 ára stovningardag við millum annað at skipa fyri stórum føðingardagshaldi á vøllinum í Djúpumýri í Klaksvík, har øll eru hjartaliga vælkomin at verða við**

FØÐINGARDAGUR
*Tíðindaskriv frá KÍ*

Tað var tann 24. august í 1904, at Klaksvíkar Ítróttarfelag sá dagsins ljós. KÍ er sostatt næstelsta fótbóltsfelag í landinum.

Sostatt er nú bert er eitt ár, til felagið rundar tey 100 árini, tá ein vanliga ger serliga nógv burturúr, men ein 99-ára føðingardagur skal sjálvandi eisini hátíðarhaldast, ikki minst tá talan er um eitt so sigursvant felag sum KÍ, sum hevur vunnið flest FM-heiti her á landi.

Eitt av tiltøkunum, sum verða fyriskipað í hesum sambandi, verður leygardagin tann 23. august – dagin fyri sjálvan 99-ára føðingardagin, sum er sunnudagin 24. august 2003

### Nógv til børnini

Saman við góðum fólki og stuðlum hevur felagið tikið stig til eitt serligt føðingardagshald á vøllinum, sum serliga er ætlað familjunum og børnunum.

Á skránni verður: Jonglеringskapping, brotssparkskapping, rulluskoytukapping, rodeotarvur, skrúðgonga úr Klaksvíksgarðinum við Klaksvíkar Hornorkestri á odda, myndatøkur, kapping í FIFA 2003 á stórskíggja, KÍ-fótbóltsspælikapping, KÍ-café.

Umframt alt hetta verður ein pallur settur upp á vøllinum, har búktalarin Absalon og gyklarin Ásbjørn fara at undirhalda. Eisini fara fyrstudeildarleikarar hjá KÍ saman við Bláu Bylgju at syngja KÍ-sangin saman við øllum hinum. Silvi kemur eisini á vitjan. Alt á vøllinum verður ókeypis.

Tað vanliga er, at slík tiltøk, t.d. tivoli, taka pening fyri hvørja ferð ein vil royna okkurt, men soleiðis er ikki hesaferð.

KÍ heldur føðingardag og bjóðar tí øllum ókeypis at royna tað, sum verður at royna á vøllinum.

### Stórt mat- og køkutombola

Umframt øll tey ókeypis tiltøkini verður eisini eitt stór mat- og køkutombola. Hetta tombola er ætlað sum ein partur av ungdómsarbeiðnum hjá KÍ, og her verður hugsað um, at peningurin verður nýttur til klæði, útgerð o.s.fr., sum ungdómurin skal brúka.

### Stór familjukonsert í KÍ-høllini

Um kvøldið verður stór familjukonsert inni í KÍ-høllini. Á skránni verða landaplágur frá seinastu 25 árunum, sálmar, poppur og annað mangt, sum verður framført av ymiskum kendum sangararum úr Klaksvík.

Millum sangararnar kunnu nevnast Karl Martin Samuelsen, Arnfríð Lützen, Birgir I. Sigurðsson, Jákup Marnar Anthoniussen og Hans Jákup Nystrøm, ið fara at framføra landaplágur saman við navnframum tónleikarum.

Eftir midnátt, verður stórt ungdómsdiskotek.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Listaframsýning og hugnakvøld

**Fríggjadagin letur Verkhúsið Stíggjur upp listaframsýning í Riberhúsi í Fuglafirði. Um kvøldið verður hugnaløta í Mentanarhúsinum, har millum onnur Angela og Hannibal fara at undirhalda**



*Fríggjadagin letur áhugaverd framsýning upp í Riberhúsi í Fuglafirði. Tað eru tey, sum starvast á verkhúsinum, Stíggi í Saltangará, sum sýna fram myndir og lutir*

FRAMSÝNING
*Orð og myndir*
*Rúna Sivertsen*

Nú, 10 ár eru liðin, síðani Verkhúsið Stíggjur í Saltangará byrjaði virki sítt, og at tað í ár er ár teirra brekaðu, skipa Verkhúsið Stíggjur og Frítíðarklubbin í Saltangará fyri framsýning og hugnakvøldi.

Á framsýningini í Riberhúsi, sum letur upp fríggjadagin klokkan 5, verða bæði listaverk og lutir at síggja, sum tey, ið dagliga starvast á verkstaðnum hava gjørt.

Millum framsýnararnar er Magni Mikkelsen av Toftum, sum í fjør varð kosin, »Ársins myndlistafólk 2002«.

Framsýningin verður opin hvønn dag til hósdagin í næstu viku.



*Myndirnar eru vakrar og litfagrar og hvørt listafólkið hevur sín stíl*

### Fernisering og sangur

Tá framsýningin letur upp, fer formaðurin í MBF, Marjun Sigurðsdóttir, at siga nøkur orð.

Elisabeth á Fríðriksmørk og Lis Poulsen fara at syngja saman við John Mortensen, sum eisini leggur rødd til - og 8 ára gamla Birgit úr Klaksvík fer at syngja ein sang av fløguni, »Vælskapt Brek«.

Myndlistin hevur frá byrjan verið ein partur av arbeiðnum á Stíggi, men eftir eitt skeið, sum var í mai í fjør, fóru tey rættiliga í gongd á listaliga økinum. Tað var Jórun Dánjalssdóttir, ið skipaði fyri hesum skeiði, og eigur hon, saman við Dagmar Beder, sum starvast sum pedagokur á Stíggi, æruna fyri, at tey á verkhúsinum eru komin so langt innan listina.

Skeiðið førdi við sær, at framsýning varð á Torginum í SMS. Henda framsýning hevði stóran áhuga millum fólk og tað eydnaðist at selja nógvar myndir.

**Framsýningin í Riberhúsi verður opin soleiðis:**

Fríggjadagin klokkan 17 letur framsýningin upp.

| | |
|---|---|
| Leygardagin: | 11.00 - 13.00. |
| Sunnudagin: | 15.00 - 19.00 |
| Mánadagin: | 11.00 - 17.30 |
| Týsdagin - hósdagin: | 15.00 - 17.30 |

### Glað og errin

- Vit vóna, at henda framsýningin eisini verður væl vitjað, og at nakað verður selt, so tey menningartarnaðu fáa áræði at arbeiða víðari við hesum neista, sum er kveiktur, sigur Poulina Johannesen, leiðari á Stíggi.

Tað starvast 19 fólk á Stíggi, sum bera brek av ymiskum slag. Tey gera nógv handaligt arbeiði, eitt nú seyma, brodera, binda, smíðja og mangt annað - og ikki at gloyma myndlistina, sum tey eru glað og errin um.



*Umframt myndirnar, verða eisini handgjørdir lutir av ymiskum slagi at síggja á framsýningini*

# Super hugnakvøld

**Í samband við listafrasýningina hjá Stíggi í Riberhúsi, skipar Frítíðarklubbin fyri góðum og fjølbroyttum hugnakvøldi í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið**

HUGNAKVØLD
*Rúna Sivertsen*

Veitslurnar og hugnaløturnar hjá teimum menningartarnaðu eru altíð nakað fyri seg - og fríggjakvøldið verður enn eitt høvi at hugna sær saman við hesum fólkum, sum duga at gleðast so tað forslær.



*Skunda tær og keyp atgongurmerki, siga tey, ið skipa fyri óførum hugnakvøldi í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið*

Hugnakvøldið byrjar klokkan 19, og skráin er fjølbroytt við borðhaldi og leskiligari matskrá.

Karl Martin Samuelsen og Terji Rasmussen skipa fyri góðum felagssangi, og Emma Vágoy fer saman við øðrum at syngja.

Eftir borðhaldið verður dansur, og tá fara Arni Carlsen og Kenneth Rasmussen at spæla.

Enn eru atgongumerki eftir, siga fyrireikararnir. Tey eru at fáa í Kiosk Vár í Klaksvík og Runavík, Shellstøðini við Streymin, Statoilstøðini í Gundadali, Mylluni í Miðvági og Shellstøðini í Vági.